einfaldari
- ger tað einfaldari
Mai 2011

# Samtalur og bøn



Glóðin er ein tænasta í Lívdini, sum er ein útrættur armur til menniskju, sum hava eitthvørt at stríðast við sum t.d. tunglyndi, ótta, sorg, vreiði, hjúnabandsviðurskifti ella tvístøður. Fólk frá Glóðini eru tøk aftan á seinna møtið sunnudagar at samtala ella at gera avtalu um samtalu.

Í Glóðini møtir tú persónum, sum lurta við opnum sinni, møta tær, har tú ert, og kunnu hjálpa tær at síggja nýggjar møguleikar. Ella bara lurta og biðja fyri tær. Fólkini í Glóðini hava tagnarskyldu.

Til ber at venda tær til Glóðina á tlf. 280011. Samtalur kunnu eisini fara fram í Lonini oman Hoydalar 28 í Hoyvík.

### Vit liva í broytingartíðum

Vit liva í broytingartíðum! Vit – samkoma Kristusar – liva í mest spennandi tíðini í kristnu søguni. Møguleikarnir um allan heimin eru spennandi, nýggir og óavmarkaðir. Framíhjárætturin og møguleikarnir at røkka út til menniskju við einum boðskapi um vón og stavnhald hava ongantíð verið størri enn nú. Tó, sum vit hyggja at heiminum í dag, so kann eingin nokta fyri, at Harrans afturkoma stendur fyri durum, og at Harrin fyrireikar brúður Sína um allan heimin at koma heim. Latið okkum arbeiða, meðan dagur er, tí náttin nærkast í hvørjum (Jóh. 9:4; Róm. 13:12).

*Jógvan Zachariassen*

## Hendingar & tiltøk

### Lega fyri støk




Lega fyri støk verður á Zarepta frá 13.-15. mai. Byrjað verður fríggjakvøldið 13. mai, og hildið verður fram til eftir middag 15. mai.

Legan er fyri støk, sum eru 30 ár og eldri. Umframt hugnaløtur og undirhald verða bíbliutímar og hugleiðingar við Ernu Háberg, Preben Hansen, Poul Guttesen og Elsu og Róland í Skorini.

Heitið á leguni er Vel lívið! Lívið er ein gáva, og einki er sum, tá lívið hepnast. Men lívið er eisini til tíðir tungt. Tað er lætt at velja lívið, tá tú stendur á tindinum, og lotið er lýtt. Men kunnu vit velja lívið, tá bylgjurnar bróta, og andróður er? Meira upplýsingar á www.zarepta.fo

### Missiónsbólkur

Ætlanin er at savna tey, sum hava hjarta fyri missión, í ein bólk við tí í huga, at vit betur skulu duga at vera nakað fyri okkara trúboðarar, men eisini fyri tey, sum umhugsa at fara út í missión í styttri ella longri tíð.

Hugsanin er ikki, at bólkurin skal savnast regluliga, men bert, tá ið okkurt ávíst er at tosa um og eisini, tá ið trúboðarar eru heima.

Hevur tú hug at vera við í einum slíkum bólki, verður tú biðin um at boða Rúnu Berghamar frá á berghamar@kallnet.fo.

### Líðandi kristin

Nógvastaðni í heiminum eru kristin fólk, sum líða fyri sína trúgv. Vit hoyra alt ov lítið um tey, og ivaleyst hugsa tey flestu okkara eisini sjáldan um tey. Vit kunnu øll biðja fyri onkrum teirra, og uppskot er tí komið um, at vit hvør í sínum lagi biðja fyri einum ávísum líðandi kristnum hvønn dag. Í summum førum ber eisini til at skriva til viðkomandi ella familjuna.

Kundi tú hugsað tær at verið við í hesi tænastuni, kanst tú senda Rúnu Berghamar teldubræv á berghamar@kallnet.fo

### Navnalistin

Nógv fólk, sum hava gjørt Lívdina til sítt andaliga heim, standa ikki á navnalistanum. Vit heita tí á øll um at seta seg á navnalistan. Samstundis heita vit á øll um at kanna eftir, um upplýsingarnir á navnalistanum eru rættir.

Tilmelding og broytingar skulu sendast við telduposti til: livdin@livdin.fo.

### Húsið eitur Lonin



Eftir eina innanhýsis navnakapping í Lívdini hava húsini oman Hoydalar 28 fingið navnið Lonin.

## Fokus á ungdómin




Vikuskiftið 6. - 8. mai verður fokus sett á tey ungu - við heilt serligum ungdómsmøtum fríggjakvøld, leygarkvøld og sunnudag í Badmintonhøllini í Klaksvík.

Dan & Suzie Potter, vanliga nevnd DUZIE, vitja nevniliga oyggjarnar hesar dagar, og tey brúka síni heilt fantastisku evnir at náa út til ungdómin og øll, sum hava við ung at gera. Umframt ungdómsmøtir, verður spennandi seminar um ungdómsarbeiði leygardagin frá kl. 10 - 18. Tilmelding fer fram á heimasíðuni www.om.fo, har ein eisini kann lesa meira um møtitíðir o.a. Øll tiltøkini eru ókeypis.

## Nýggj ungdómsheimasíða




Ignite, sum er ungdómsarbeiðið hjá Lívdini, hevur fingið eina nýggja heimasíðu, sum eitur www.ignite.livdin.fo

## Minibíbliuskúli og bønarmøti




Minibíbliuskúli er týskvøld í Lonini oman Hoydalar 28. Kvøldið verður skipað soleiðis, at frá kl 18.50–20.20 verður mini bíbliuskúli, og frá kl. 20.30-22.00 verður bønarmøti. Vit heita á samkomuna um at halga týskvøldið til samfelag, læru og bøn.

## Skráin fyri týskvøldini mai 2011

| | |
|---|---|
| Týskvøldið 3. mai | Kyknubólkar (Lonin opin til bøn) |
| Týskvøldið 10. mai | Gávur Guds – Samkoman (Høgni Johannesen) |
| Týskvøldið 17. mai | Gávur Guds – Bíblian (Poul Guttesen) |
| Týskvøldið 24. mai | Kyknubólkar (Lonin opin til bøn) |
| Týskvøldið 31. mai | Gávur Guds – Afturkoma Jesusar (Jógvan Zachariassen) |

## PAROLA - ein ferð í Orðinum

Frá 12. - 21. juli 2011 verður eitt føroyskt bíbliuskeið hildið í Italia.

PAROLA, ið merkir orð, hevur til endamáls at geva trúgvandi føroyingum møguleika at koma burtur frá strongda gerandisdegnum og brúka tíð í Orðinum og at geva teimum møguleika at fáa nakað av innliti í trúboðaralívið.

Skeiðið verður hildið í Molise landspartinum í Suðuritalia, har Heidi og Regin Guttesen búgva og virka. Undirvísarar verða Jógvan Júst Rasmussen, Einar Vang og Regin Guttesen.

Um hetta hevur tín áhuga, kanst tú seta teg í samband við Einar Vang (e_vang@olivant.fo / Tel 228038) ella Regin Guttesen (reginguttesen@gmail.com / Tel +39 32 8141 2581) og fáa meir at vita um PAROLA og um, hvussu tú kanst tekna teg.

# Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

**Sunnudagin 1. mai**

| | |
|---|---|
| Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: | Evni: Trúboðari á Filipsoyggjunum<br>Talari: Monika Kunoy Sharp |
| Lovsongur og tala kl. 12.00: | Evni: Rómbrævið 15:22-33<br>– Tørvurin at fara til Jerúsalem<br>Talari: Jógvan Zachariassen |




**Sunnudagin 8. mai**

| | |
|---|---|
| Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: | Familuløta v. Ildu og Rúna Lómstein |
| Lovsongur og tala kl. 12.00: | Evni: Opið evni<br>Talari: Elsa í Skorini |




**Sunnudagin 15. mai**

| | |
|---|---|
| Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: | Evni: Tónleikarin - komandi ættarliðið<br>Anna Háberg tosar við ungar tónleikarar |
| Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: | Evni: Avbjóðingin í lovsangi<br>Talari: Anna Háberg |




**Sunnudagin 22. mai**

| | |
|---|---|
| Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: | Evni: "Manuel og tað lovaða landið"<br>(1. partur av 4)<br>Talari: Beinta Áargarð |
| Lovsongur og tala kl. 12.00: | Evni: Makt og myndugleiki<br>Talari: Absalon Áargarð |




**Sunnudagin 29. mai**

| | |
|---|---|
| Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: | Evni: "Manuel og tað lovaða landið"<br>(2. partur av 4)<br>Talari: Beinta Áargarð |
| Lovsongur og tala kl. 12.00: | Evni: Rómbrævið 15:22-33<br>– Tað andaliga og tímiliga í Guds verki<br>Talari: Jógvan Zachariassen |




**Ungdómstiltøk:**
Alive: leygarkvøld kl. 21.00

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · faldarin@livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*